# Gongdin hevur givið honum høgan aldur



*John Lassen stæddur í Føgrulíð*



*John Lassen her saman vð Hanus G Johansen í Føgrulíð*



*John Lassen ger seg út til at fara leiðina um fjallið*

**Millum tey mongu, sum vóru til tað serliga háskúlatiltakið í Føgrulíð á Borðoynni í fjørsummar, var klaksvíkingurin John Lassen, sum hóast síni 92 ár helt á fjøllini - báðar vegir**

FÓLK OG NÁTTÚRA
*Jan Mùller/Árni Joensen*
*jan@ras2.fo*
*arni@sosialurin.fo*

Tað er ikki hvørjum manni beskorið, at røkka teimum 92 árunum, og uppaftur færri eru teir ella fyri tann skuld tey, sum við so mongum árum á baki orka ella hætta sær á fjøllini. Men klaksvíkingurin John Lassen setist ikki aftur ella sendir ikki avboð, sjálvt um hansara luttøka krevur, at hann fer upp niðan onkra líðina og upp um okkurt skarðið. Tí gjørdi hann heldur ikki nógv burtur úr sær, tá Rás2 hitti hann í Føgrulíð til háskúlatiltakið har í fjørsummar.

Hetta var ikki fyrstu ferð, at John Lassen ella John hjá Amerikanaranum, sum hann eisini verður róptur, var í Føgrulíð. Sum smádreingir plagdu hann og javnaldrarnir í Klaksvík at fara hagar, og nú hann er farin um tey níti, var tað framvegis hugurin at ganga, sum fekk hann at gera ferðina eina ferð afturat í fjørsummar.

– Ja, tað var mest fyri at sleppa at ganga higar, segði hann við Rás2, og satt at siga hevði hann léttari at draga andan enn blaðmaðurin, sum helt mikrofonini og myndatólinum. Men John hevur eisini kondisjón, sum tað nú eitur. Hann var fjallmaður í mong ár, og sum 80 ára gamal hevði hann ta ovastu ódnina á fjalli í Árnafirði. Og hann gongur enn.

– Eg og hundurin ganga ein fjórðing um dagin og njóta náttúruna, sigur hann og leggur afturat, at gonguhugurin man vera ein stór orsøk til, at hann hevur rokkið so høgum aldri.

### Styðjaði Háskúlan

Tað var tó ikki bara gongutúrurin, sum fekk John Lassen at fara í Føgrulíð hendan dagin. Sjálvur gekk hann á Føroya Fólkaháskúla í Havn veturin 1936-37. Hví hann fór?

– Eg haldi, at tað var mest fyri at halda Háskúlan gangandi. Tað var so lítið av fólki ella í hvussu er dreingjum á skúlanum í tríatiárunum, sum vóru so ring, sigur John Lassen.

Sjálvur ivast hann ikki í, at Háskúlin hevur havt stóran týdning og serliga fyri málið. Men í dag er verri, sigur hann, tí í fjølmiðlunum er alt vorðið enskt, sjálvt tað, sum sungið verður.

## Nøvn í farna ári

Mangar vórðu hendingarnar í 2009. Og mong vórðu fólkini aftanfyri hendingarnar. Ein av hesum hendingum var stóra hátíðarhaldið í Føgrulíð í fjørsummar. Og ein av luttakarunum var 92 ára gamli John Lassen úr Klaksvík, sum helt á fjøllini báðar vegir. Her er søgan um hendingarríka túrin og løtuna í fjørsummar.